# Tiltøk

**Gudstænastur 17. oktober**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Sverri Steinhólm, altarg., skriftamál kl. 10.40
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11
Ann D. Hansen, altarg., skriftamál kl. 10.40
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Heri Joensen. Talvan gongur fyri KFUM-skótarnar í Føroyum. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Argja kirkja:** kl. 11
Bergur Debes Joensen. Altarg. Talvan gongur fyri KFUM-skótarnar í Føroyum. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Hests kirkja:** kl. 12
Derhard Jógvansson, altarg.
**Kollafjarðar kirkja:** kl. 12
Henning Bøgesvang. altarg.
**Tvøroyrar kirkja:** kl. 11
Bjarni Bæk
**Árnafjørður:** kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen. Svf.
**Vestmanna:** kl. 11
Inga Poulsen Dam
**Christianskirkjan:** kl. 11
Hanus á Gørðum, altarg.
**Oyndarfjøður:** kl. 12
Símun P. Jacobsen
**Selatrað:** kl. 17
Símun P. Jacobsen
**Fríðrikskirkjan:** kl. 11
Martin R. Jacobsen, altarg.
**Sandavágur:** kl. 11
David Johannesen, altarg.
**Leirvíkar kirkju:** kl. 12
Niels Pauli Danielsen, altarg.
**Haldórsvík:** kl. 12
Theodor E. D. Olsen, altarg.,
**Skúvoy:** kl. 12
Jákup R. Hansen, altarg.
**Fuglafjarðar kirkja:** kl. 12
Lestur og sunnudagsskúli

**Adventistakirkjan**
Leygardagin kl. 10 Bíbliugrannsking við Bergur Jensen. Kl. 11 Gudstænasta við Odd Fuglestad.

**Katólska Kirkjan**
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit. Sunnudag kl. 11 hámessa v/Matthieu Smolders, prestur í Mariukirkjuni. Sunnudagsskúli kl. 14.

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18
Møti v/ Argjakórinum

**Samkoman Marknagil Fjalsg.2, Tórshavn**
Sunnumorgun kl. 10.30
Breyðbróting. Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20
Bønar/uppbyggingarmøti.
Ver hjartaliga vælkomin.

**Lívdin í Skúlanum við Løgmannabreyt**
Leygarkvøldið
Alive kl. 21. Møti fyri ung.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/Tórur Thomsen.

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Tórshavn**
Fríggjakvøldið kl. 20
Ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 11.30
Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/sunnudagsskúla. Verið hjaraliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur 18. okt. kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman við Magnus Brahè Jørgensen. Evni: Brot úr Føroya Kirkjusøgu.
Týsdagur 19. okt. kl. 18 í KFUK. Várgleði fyri børn og juniorar. Kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdini hjá Hera Joensen, Bergi Debes Joensen og Derhardi Jógvanssyni.
Mikudagur 20. okt. kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur. Kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdini hjá Sverra Steinhólm og Ann Dahl Hansen.
Hósdagur 21. okt. kl. 20 í KFUK: Varðmenn hittast.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin onki morgunmøtið vegna legu. www.gospel.fo

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Dan Eliassen, sangur Sámal J. Jakobsen. Øll eru vælkomin

**Filadelfia Tórshavn**
Fríggjadag kl. 7.15
Morgunbøn. Kl. 20 Mammur hittast til bøn.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 11
Morgunmøti, Alex O'Campoo talar. Kl. 13.15 SundagsKool. Kl. 18 Samkomufundur
www.filadelfia.fo

**Fríkirkjan Oasan**
Fríggjakvøldið kl. 20 After8.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Tóra Slættalíð.
Kl. 12 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti
Verið hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Leygardag kl. 14-18 Sera áhugaverdur fyrilestur við heitinum "Er Bíblian álitandi?" Fyrilestrarhaldari er Dr. David Reid. Øll eru vælkomin, ikki er neyðugt at melda seg til.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Dr. David Reid talar. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Dr. David Reid talar. Barnaansing er meðan møti er.
Mánakvøldið kl. 20.30
Hugnaløta fyri yngri kvinnur.
www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti v/Sunudagsskúla.
Kl. 17.30 Bøn. Kl. 18 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Gongutúrur**
Sunnudagin verður gongutúrur til tjarnirnar á Kirkjubøreyni. Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 10. Túrurin er hampiliga lættur. Havið heit og góð gonguklæði, ein heitan munn og matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni, á tlf. 302425 ella á torsinfo@torshavn.fo

**Missiónshúsið í Skálavík**
Missiónsvíka verður í døgunum 10. til 14. nov.

**Sandur**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og møti v/Johannes Danielsen. Óløf Tungá og fleiri syngja.
Mikukvøldið er bøn og sangløta kl. 20

**Filadelfia Vágar**
Sunnudagin kl. 11 Møti.
Kl. 11.30 sunnudagsskúli.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14 við Drama. Møti verður kl. 18 við Solveig og John, Hanna og Terje syngja,
Týskvøldið verður bønarløta kl. 19.30 og Ferðafrásøgn og myndir frá Rumenia v/ Hardis, Gudny og Andreu. Vælkomin

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 19 juniormøti.
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti v/ Hanus Thomsen. Evni: Eitt annarleiðis lív.
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli. Kl. 17 familjumøti v/ Mariann Poulsen. Byrja verður við grýturætti fyri alla familjuna. Kl. 18 bíbliusøga og sangur. Barnakórið luttekur. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Hjúnarbandsskeiði við Sten Palmqvist byrjar fríggjakvøldið kl. 20 og heldur fram leygarmorgunin kl. 9.30.
Leygarkvøldið kl. 21 Awake.
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangara**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti
Øll hjartaliga vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
byrjar aftur mánakvøldið 18. okt. kl. 19.30 í missiónshúsinum á Glyvrum. Allar kvinnur eru vælkomnar

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Tala: Andreas Andreasen
Sunnudag kl. 17 Møti við Steen Palmqvist. Evni: Hjúnarbandi. Sunnudagsskúli. Um tær manglar fart, so ring á 447090 ella 775091.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin
kl. 14.00 Sunudagsskúli
kl. 17.30 Bønarløta
kl. 18.00 Konfirmantveitsla
kl. 21.00 Ungdómsmøti

**Soli Deo Gloria**
Leygarkvøldið kl. 20 møti v/ Helle og Daniel Ottsen.
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Helle og Daniel Ottsen
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti

**Getsemane, Stangaskákið 1, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30
Ungdómsmøti v/Andrias Nýggjagarð.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Jan Joensen. Barnamøti er samstundis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting.

**Missionshúsið á Viðareiði**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Johannes Johannessen og Óli Marner Christiansen. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Vegna heystferiu verður eingin sunnudagsskúli sunnudagin. Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Árna og Ásbjørg Kjærbæk. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Seglloftið/Tvøroyri**
Sangløta á Seglloftinum! verður leygarkvøldið kl. 20.30. Sangbólkurin Keldan (v/ Svein Petersen, Finnbjørn Nielsen, Eddie Bech, Otto West) syngja og spæla.

**Frelsunarherurin Vágur**
Fríggjadagin kl. 9.30 orðið á borðið. Sunnukvøldið kl. 18 møti Eingrím Holm og fleiri.
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta
Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið. Kl. 20 Heimaforbund.
Mikudagin kl. 14.30 barnakór.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag – hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Fríggjadagur
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10.30 Bindiklubbur.
Kl. 14-16 Prát.
Mánadagur
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði. Tilmelding: 316491, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Enskt talumál
Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl
Kl. 14-16 Telduskeið: Grundskeið (óroynd), Páll Poulsen. Tilmelding: 316491
Týsdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið
Kl. 10 Vit syngja, Victor Carlsen. Øll eru vælkomin.
Kl. 11-13 Telduskeið, Víðkað skeið (alnótin), Páll Poulsen
Kl. 14-16 Víðkað skeið (myndir), Páll Poulsen.
Tilmelding: 316491
Kl. 15 Vit pakka skógvaeskjur til tiltakið Chrismas child. Øll eru hjartaliga vælkomin
**Nýtt tiltak:** Matklubbur, Fríggjadag kl. 10-13. Tilmelding: 316491. Byrjar 21. okt.
**Telduskeið:**
Mánadag kl. 14-16 Grundskeið (óroynd), Páll Poulsen.
Týsdagur 11-13 Víðkað skeið (alnótin), Páll Poulsen. Kl. 14-16 Víðkað skeið (myndir), Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
Týsdagur kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Kl. 10 Vit syngja, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru vælkomin. Kl. 15 Prát.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Føroysk advent- og jólaguðstænasta í Aalborg Klosterkirke**
Sunnudagin, hin 28. nov. kl. 14 verður føroysk guðstænasta í Aalborg Klosterkirke. Aftaná guðstænastuna fáa vit ein drekkamunn í grannalagnum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Lisbeth Solmunde Michelsen, prestur í Vodskov*

**Føroyingafelagið Vesturskin í Bergen**
Vit koma saman 24. okt. Øll eru vælkomin. Nærri at vita hjá formanninum Anniku Sleyre, tlf. 55166077.

**Blákrossbúðin Kongagøta 10, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum,
Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14.
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Limirnir koma saman í Losjuni mikukvøldið 20. okt. kl. 19.

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnukvøldið kl. 18 er møti við Oasubrøðunum.

**Listasavnið á Sandi**
er stongt allan oktober mánaða, men letur upp aftur í november. Frá november til mai er bara opið sunnudag kl. 14-16. Bólkar o.o., sum vilja gera seratvalu um aðrar tíðir kunnu ringja á tlf. 211924 ella 361617 í góðari tíð frammanundan.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará. Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.* Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18. Øll eldri eru vælkomin*

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
*Opið er: Mánadag, týsdag og mikudag frá kl. 15-18.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
*dagtilhaldid@post.olivant.fo*
*Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30 – 17.30* Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a. Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

## Brúdleyp



Leygardagin 23. okt. giftast Christina av Reyni, Tórshavn, og Leif á Bøgarði, Kaldbak. Vígslan verður á AutoService kl. 12 , eftir vígsluna eru øll vælkomin til brunch. Øll eru hjartaliga vælkomin.



Leygardagin 13. nov. giftast Martha Isabella T. Thomassen og Birgir Lauritsen, Miðvágur. Vígslan verður í Miðvágs kirkju kl. 14. Opið hús verður í SÍF húsinum í Sandavági frá kl. 19. Tey ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 23. okt. Martha tlf. 257329 - Birgir tlf. 269797 heima tlf. 332433 - mail martha-birgir@hotmail.com - martha-birgir@hotmail.com